**Heilsuhjálparafelag Føroya**

Slejd 6

**Samferðslumálaráðið**

**Tórshavn 30.08.2018**

**Hoyringsskriv í samband við uppskot um broyting í løgtingslóg um trygging móti avleiðingum av arbeiðsskaða. ( Arbeiðsskaðatryggingingarlógin).**

Heilsuhjálparafelag Føroya hevur fingið omanfyri nevnda lógaruppskot til hoyringar, og hava vit hesar viðmerkingar:

Talan er sambært uppskotinum um at uppgávurnar hjá Føroya Vanlukkutrygging verða lagdar til Arbeiðs- og brunaeftirlitinum at umsita.

Víst verður á fleiri viðkomandi fyrimunir við uppskotinum, og eru vit sannførd um, at henda ætlaða flytingin av uppgávunum ikki á nakran hátt má gera umstøðurnar verri fyri borgaran.

Um hendan ætlaða flytingin av uppgávum verður framd, og Vanlukkutryggingarráðið verður avtikið, er minsta krav, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur í minsta lagi líka góðar førleikar at viðgera mál, ið koma til stovnin, sum Vanlukkutrygingarráðið hevði.

Viðvíkjandi § 26. Stk. 2, ásetingin ásetur herdar gegnisreglur fyri starvsfólk hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, og tekur felagið undir við hesum.

Vinarligar heilsanir

*Heilsuhjálparafelag Føroya*

Mary Antonsdóttir, forkvinna

Ása Olsen, fyrisitingarleiðari

*Fr. Petersensgøta 7 · FO-100 Tórshavn*
*Telefon 317725 · Fax 319117 · email: hhff@hhff.fo · heimasíða.: www.hhff.fo*